# NÓSI HEVUR FØÐINGARDAG

# Til lukku, Nósi

Nósi heldur føðingardag frá mánadegnum 22. til fríggjadagin 26. september! Hetta tíðarskeið vitjar hann allar Føroya Banka-deildirnar.

## Ferðaætlan hjá Nósa kring oyggjarnar

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Norðuroyggjar** | | | |
| Klaksvík | týsdagin | 23-09-2003 | kl. 10.30-11.00 |
| Klaksvík | týsdagin | 23-09-2003 | kl. 14.30-15.30 |
| **Eysturoy** | | | |
| Leirvík | mánadagin | 22-09-2003 | kl. 13.00-14.00 |
| Gøta | mánadagin | 22-09-2003 | kl. 14.30-15.30 |
| Eiði | mánadagin | 22-09-2003 | kl. 14.30-15.30 |
| Norðskáli | týsdagin | 23-09-2003 | kl. 14.30-15.30 |
| Fuglafjørður | mikudagin | 24-09-2003 | kl. 14.30-15.30 |
| Saltangará | hósdagin | 25-09-2003 | kl. 10.30-11.00 |
| Toftir | hósdagin | 25-09-2003 | kl. 14.30-15.30 |
| Saltangará | hósdagin | 25-09-2003 | kl. 16.30-17.30 |
| Strendur | fríggjadagin | 26-09-2003 | kl. 13.00-14.00 |
| Skáli | fríggjadagin | 26-09-2003 | kl. 14.30-15.30 |
| **Vágar** | | | |
| Miðvágur | hósdagin | 25-09-2003 | kl. 14.30-15.30 |
| Sørvágur | hósdagin | 25-09-2003 | kl. 16.00-17.00 |
| Sandavágur | fríggjadagin | 26-09-2003 | kl. 13.30-14.30 |
| **Sandoy** | | | |
| Skopun | fríggjadagin | 26-09-2003 | kl. 14.00-14.30 |
| Sandur | fríggjadagin | 26-09-2003 | kl. 15.00-15.30 |
| **Suðuroy** | | | |
| Vágur | mánadagin | 22-09-2003 | kl. 14.00-15.00 |
| Hvalba | týsdagin | 23-09-2003 | kl. 13.00-13.30 |
| Tvøroyri | týsdagin | 23-09-2003 | kl. 14.30-15.30 |
| **Streymoy** | | | |
| Kollafjørður | týsdagin | 23-09-2003 | kl. 13.00-14.00 |
| Vestmanna | mikudagin | 24-09-2003 | kl. 14.00-15.00 |
| N. Finsensgøta | hósdagin | 25-09-2003 | kl. 10.30-11.30 |
| Hornabøur | hósdagin | 25-09-2003 | kl. 13.00-14.00 |
| SMS | hósdagin | 25-09-2003 | kl. 14.30-15.30 |
| N. Finsensgøta | hósdagin | 25-09-2003 | kl. 16.30-17.30 |




Kom inn á gólvið í føðingardags-vikuni og hav sparikistilin við, so seta vit peningin inn á tína Nósa-konto og tú fært eina flotta mateskju heim við!

FØROYA BANKI




# Statoil rakt av muturgølu

**Almenna norska oljufelagið er rakt av einari álvarssamari muturgølu.**

Í síðstu viku misti leiðarin á útlandsdeildini hjá Statoil, Richard John Hubbard, starvið, eftir at blaðið Dagens Næringsliv hevði avdúkað, at felagið hevði nýtt ósømiligan atburð í royndum sínum at fáa part í oljuvinnuni í Iran.

Blaðið avdúkaði, at Statoil seinasta summar gjørdi eina avtalu við eitt íleggingarfelag, sjálvt um norska felagið visti, at íleggingarfelagið nýtti ein son iranska forsetan, Hashemi Rafsanjani, til ráðgeva, og at hesin er stjóri í einum av dóttirfeløgunum hjá almenna iranska oljufelagnum Nioc.

Avtalan millum Statoil og íleggingarfelagið var 115 milliónir krónur verd, at Dagens Næringsliv avdúkaði, at Statoil hevði flutt 40 milliónir krónur á eina konto í Sveits, hvørs eigari er eitt felag, sum er skrásett í einum skattaparadísi í Karibiska Havinum.

Uttanlandsstjórin fekk sekkin alt fyri eitt, og í gjár skuldi nevndin í Statoil gera av, um málið eisini skuldi kosta sjálvum aðalstjóranum, Olav Fjell, starvið. Tað er avdúkað, at hann hav sínum undirmonnum boð um at dylja sambandið við iranska forsetasonin.


## Eitt framúrskarandi høvi at reka handil – og eitt gott frítíðarstarv

**Forever Living Products – økir søluna í Føroyum**

Kom og hoyr hvussu tú kanst gerast partur av heimsumfatandi succes.

25 ára gamalt millumtjóða virki víðkar sítt virksemi til Føroyar. Vit leita tí eftiridnum, álítandi og fyrikomandi Team-leiðarum og frítíðarseljarum um alt Føroya land.

**Tað er fíggjarliga vandaleyst – bert lítil vøruíløga.**

Vantandi royndir sum seljari er ongin forðing, bert tú hevur eitt fitt smíl – og hevur hug at læra.

**Tú má vera minst 25 ár.**

Tað verður presentatiónsfundur/framløgufundur hóskvøldið tann 18. september 2003 kl. 19.00 á Hotel Hafnia.

Neyðugt er við tilmelding hjá sjálvstøðugum distributøri/útdeilara Maritu Guttesen.

Ókeypis upplæring um vøruna og virksemið fyri tey ið ætla at gerast seljarar í samstarvi við Maritu Guttesen verður tann 20. og 21. september.



Boða frá luttøku hjá Maritu Guttesen
tel 31 32 54
far 52 32 54

Sosialurin 341800



Sosialurin
1
Fyrst við tí seinasta



## Frá S & K felagnum

Kunnandi fundur um S & K felagið og nýggja sáttmálan verður í hølinum hjá Virkinum á Sandi mikudagin 17. sept. 2003 kl.19.00.

Øll eru vælkomin.

S & K nevndin



VØRUMESSUBLAÐIÐ

sum vit ætlaðu skuldi
í mikudagsblaðið
er flutt til

**Fríggjadagin 19. september**

Sosialurin 341800

Arjgiavegur 26 · tel 34 18 00 · fax 34 18 01 · e-mail: post@sosialurin.fo Sosialurin



## AT VELJA PRENTSMIÐJU OG TIMBURMANN ER NAKAÐ TAÐ SAMA

Tit vilja hava fatur á tí besta handverkaranum, honum, tit kunnu hava álit á, einum meistara, ið ikki leggur eykarokning oman á eykarokning. Einum, sum kemur tann dagin, hann hevur lovað og verður liðugur tann dagin, hann hevur lovað.

Ljóðar hetta sum eitt brot burtur úr „Sagnum og ævintýrum“?

Á Hestprent smíða vit ikki hús, men vit gera alt grafiskt arbeiði. Tað vil siga uppseting, prent og innbinding.

Tín prentlutur er í góðum hondum hjá okkum. Hestprent gongur nú á tjúgunda ári, og eru vit vaksin til 20 starvsfólk.

Vilt tú vita meira, hava vitjan av sølumanni okkara, ella hava eitt tilboð sendandi, so eru vit altíð til dystin fús



Dvørgastígur 7 · Postmoga 3118 · 110 Tórshavn
Tel 314555 · Fax 318 026 · t-post: hestoy@hestprent.fo
HESTPRENT

Sosialurin 341800



www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo